gult20 cyan20 magenta20 svart20




# Fyrst við tí seinasta

## 5 ferðir um vikuna




# Ja!

# Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Undirskrift: ____________________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn


gult21 cyan21 magenta21 svart21

# ítróttur

Nr. 117 • fríggjadagur •22. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# 80.000 kr. til ÍSB




**Seiansta 13 mánaðar skeiðið hevur stuðlafelagið hjá ÍSB savnað ikki færri enn 182.000 kr.**

STUÐLAFELAG
*Jákup Mørk*

Í ár eru 15 ár síðani, at stuðlafelagið hjá ÍSB varð stovnað.

Øll hesi árini hevur stuðlafelagið havt bingo hvørt týskvøld. Esiini um summarið hevur hetta verið gjørt, og einki er at siga til, at hetta hevur verið ein sera stórur stuðul hjá ÍSB.

Stuðulsfelagið hevði aðalfund sunnudagin, og tá fekst eisini sjón fyri søgn, at áhaldni og treiskni hjá stuðlafelagnum so avgjørt eisini hevur givið úrslit. Á aðalfundinum fekk ÍSB nevnliga handað ein kekk áljóðandi 80.000 kr. Hetta er triðja ferðin innan eitt 13 mánaðar langt tíðarskeið, at ÍSB fær handað kekk frá stuðulsfelagnum. Í mei mánaði í fjør vórðu lætnar 72 tkr., meðan talan í november var um 30 tkr. Sostatt hevur ÍSB hetta seinasta 13 mánaðar langa tíðarskeiðið fingið ikki minni enn 182 túsund krónur frá stuðulsfelagnum.

Einki er at taka seg aftur í, at hetta er ein sera kærkomin gáva hjá sambandinum, tí útreiðslurnar eru nógvar í tali. Limirnir hjá ÍSB eru nógvir í talið, og umframt tey mongu, sum íðka svimjing, boccia og fleiri greinar innan frælsan ítrótt, so eru sjálvandi eisini nøkur, sum íðka kappingarítrótt á elitustøði, og hesi hava ferð eftir ferð tikið heiðursmerki heim við til Føroyar. Umframt tey íðkandi, hevur ÍSB eisini ein ráðgeva í føstum starvi.

Útreiðslurnar eru sostatt nógvar í tali, og lítið er tí at ivast í, at stuðulin kemur væl við hjá sersambandinum.

Formaðurin í ÍSB stuðlum, Martha Poulsen, sum saman við limum sínum hevur gjørt eitt megnar arbeiði, sæst her handa Jón á Steig og Egga Jensen stóra gávukekkin á 80.000 kr.

# Fýra pláss fram

**Eftir stóra fallið í mei mánaði hava Føroyar nú aftur tikið seg fýra pláss fram á styrkislistanum hjá FIFA**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast føroyska fótbóltslandsliðið hevur tapt tveir dystir, síðani FIFA listin seinast varð almannakunngjørdur, so er liðið farið fýra pláss fram.

Á listanum fyri juni eru Føroyar sostatt á einum 119. plássi. Fyri tveimum mánaðum síðani var støðan annars tann, at Føroyar vóru nummar 115, men í mei fóru fleiri aðrar tjóðir fram við okkum, tá hesar fingu góð úrslit, meðan okkara ikki spældu.

## Danmark aftur fremst

Í norðurlendskum høpi kann nú staðfestast, at Danmark aftur eigur sterkasta landsliðið. Seinastu árini hava annars bæði norðmenn og sviar verið framman fyri danir í hesum, men nýggi Olsenbandin hjá teimum reyðu hevur fingið góð úrslit seinasta árið, meðan tað sama so avgjørt ikki kann sigast um norðmenn.

Annars er oddurin á styrkislistanum at kalla óbroyttur, eftir at Frakland nú hevur yvirtikið fremsta sessin.

Niðanfyri framganga tíggju tey ovastu londini á styrkislistanum saman við norðurlendsku umboðunum. Tølini í klombrum eru styrkismetingarnar frá mei mánaði.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frakland | (1) |
| 2 | Brasilia | (2) |
| 3 | Argentina | (3) |
| 4 | Italia | (4) |
| 5 | Portugal | (5) |
| 6 | Spania | (6) |
| 7 | Kekkia | (7) |
| 8 | Týskland | (9) |
| 9 | Holland | (8) |
| 10 | Paraguei | (10) |
| 16 | Danmark | (20) |
| 18 | Noreg | (17) |
| 21 | Svøríki | (21) |
| 52 | Ísland | (55) |
| 59 | Finnland | (57) |
| 119 | Føroyar | (123) |

# Sámal framvegis ivasamur

**Sámal Joensen var ikki á GÍ liðnum undanfarna vikuskifti, og ivasamt er, nær hann aftur fær spælt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað kemur væl við hjá týdningarmikla miðvallaranum hjá GÍ, Sámal Joensen, at dysturin móti B68 er útsettur, orsakað av intertoto luttøkuni hjá toftamonnum.

Sámal, sum ikki var við móti NSÍ herfyri, stríðist við ein skaða í rygginum, og sjálvur dugir hann ikki at siga, hvussu leingi tað fer at taka, áðrenn hann aftur er klárur at spæla.

- Talan er um ein geiðsla, sum er farin meira ella minni úr lið, sigur Sámal.

- Skaðin kom undir venjing, tá eg skuldi skjóta, men allar helst er hetta okkurt, sum hevur verið ávegis.

Sum nevnt, so er miðvallarin ikki vísur í, nær hann aftur kann spæla, men hann sigur tó, at hetta undir ongum umstøðum kundi verið hetta vikuskiftið.

- Nú fáa vit at síggja. Eg fái viðgerð hvønn dag, og dysturin móti B68 er ikki fyrr enn mikudagin, so vónandi verði eg tøkur til ta tíð, sigur hann at enda.



*Ivaleyst verður stórur saknur í Sámali, um hann heldur ikki verður tøkur til dystin móti B68*

# Jóansøka

**Í yvirlitinum í gjár var tíverri ein villa komin í, tí Suðringur ikki stóð umboðaður í 10-mannafarsróðrinum. Fullfíggjaða yvirlitið yvir bátarnar á jóansøku verður tí prentað umaftur**

**5-mannafør dreingir**
1 Firvaldur
2 Drekin
3 Fípan Fagra
4 Sílið
5 Blikur
6 Tjaldrið
7 Frúgvin
8 Havfrúgvin
9 Erla Kongsdóttir
10 Beinta

**6-mannafør kvinnur**
1 Snopprikkur
2 Fortuna
3 Hvessingur
4 Jarnbardur
5 Sølmundur
6 Páll Fangi
7 Víkingur
8 Gongurólvur
9 Leirvíkingur
10 Lómur

**5-mannafør gentur**
1 Dúgvan
2 Drekin
3 Frúgvin
4 Ørnin
5 Tjaldrið
6 Sílið
7 Fípan Fagra
8 Blikur
9 Hvassi
10 Havfrúgvin
11 Firvaldur
12 Snípan
13 Báran

**6-mannafør menn**
1 Gongurólvur
2 Páll Fangi
3 Hvessingur
4 Riddarin
5 Strálan
6 Sølmundur
7 Snopprikkur
8 Fortuna
9 Fuglfirðingur
10 Lómur

**8-mannafør**
1 Ørvur
2 Argjabáturin
3 Knørrur
4 Nevið Reyða
5 Kvívíkingur
6 Ormurin Langi

**10-mannafør**
1 Vágbingur
2 Nólsoyingur
3 Vestmenningur
4 Havnarbáturin
5 Eysturoyingur
6 Skálabáturin
7 Suðringur